## Gerrard avboð

Liverpool miðvallarleikarin, Stevean Gerrard, verður ikki við á enska landsliðnum, sum í annaðkvøld spælir vinardyst móti Hollandi. Gerrard dregist við ein minni skaða í lyskuni, og tí varð hann sendur aftur til Liverpool í morgun, tá landsliðið fleyg úr Heathrow til Amsterdam. Eingin er úttikin í staðin fyri Gerrard. Eisini Ben Foster mátti geva avboð til landsdystin, tí hann fekk ein lítlan skaða í Community Shield-tapinum móti Chelsea sunnudagin. Joe Hart frá Manchester City – sum í løtuni er læntur út til Birmingham – er úttikin í hansara stað, skrivar BBC.



## Vil hava Ribery

Chelsea-eigarin, milliarderurin, Roman Abramovich, hevur sambært enska blaðnum The Sun tosað við Uli Hoeness, stjóra í Bayern München, um eitt møguligt keyp av franska stórleikaranum, Franck Ribery. Sambært blaðnum játtaði Hoeness at hava ein fund við Abramovich í vikuni, har russiski olju-barónurin fer at leggja eitt boð áljóðandi £40M, ella 346 milliónir krónur. Hetta er størsta upphædd, sum eitt enskt felag hevur latið fyri ein leikara. The Sun vil vera við, at týskarar eru so argir inn á »arrogansuna« í Real Madrid, at teir fegnir vilja selja til enska Chelsea í staðin. Hoeness hevur tó áður sagt, at Ribery ikki er til sølu.

# Eiga fyrsta málið til góðar

**Fýra ferðir hava vit spælt í móti Fraklandi, men meðan teir hava skotið 16 mál í móti okkum, hava vit ongantíð fingið bóltin í málið hjá fraklendingum**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



Fróði Benjaminsen er maðurin við flest málum í føroyska hópinum. Hann hevur skorað tríggjar ferðir

Hóast vit onkuntíð hava fingið hampilig úrslit og heiðurlig tap í móti Fraklandi, so hava vit sanniliga eisini fingið onkran lúsingin viðhvørt.

Størsta tapið fingu vit seinast, vit spældu í móti Fraklandi. Hetta var á Tórsvølli 13. oktober í 2007, har føroyska landsliðið legði rygg til eitt 0-6 tap.

Eitt ár frammanundan hevði føroyska liðið tapt 5-0 í Fraklandi.

Í 2005 vann Frakland 3-0 á Føroyum, tá Djibril Cissé gjørdi tvey mál og Súni Olsen eitt sjálvmál. Í fyrra dystinum liðanna millum í hesum bólkaspælinum, tá Fraklandi vann 0-2 í Føroyum, gjørdi Djibril Cissé eisini eitt mál. Harvið er hann tann spælarin, sum hevur skotið flest mál í móti Føroyum.

Men hann hevur altso ikki fingið landsliðsboð hesaferð. Tað hevur David Trezeguet heldur ikki. Hann hevur skotið tvey mál í móti Føroyum. Eisini Louis Saha, Ludovic Giuly, Jérôme Rothen og Hatem Ben Arfa hava skotið hvør sítt mál í móti Føroyum, men hava ikki fingið landsliðsboð.

Tískil eru tað einans Nicolas Anelka og Karim Benzema í franska hópinum hesaferð, sum hava skorað í móti Føroyum. Teir hava tó fingið tvey mál hvør.

### Fróði Benjaminsen er toppskjúttin

Í føroyska hópinum er tó eingin, sum hevur megnað at fingið bóltin í franska málið. Í teimum fýra dystunum móti Fraklandi hevur Føroyar tapt tilsamans 16-0. Og sum støðan er nú er lítið sannlíkt, at hetta samlaða úrslitið fer at vera nógv penari í annaðkvøld.

Í føroyska hópinum er Fróði Benjaminsen tann, sum í løtuni hevur gjørt flest mál. Tríggjar ferðir hevur hann skorað fyri Føroyar. Súni Olsen, Jákup á Borg, Christian Høgni Jacobsen og Christian Lamhauge Holst hava allir skotið tvey mál hvør, umframt at Bogi Løkin og Símun Samuelsen hava fingið eitt í part.

# Sleppa undan toppskjúttunum

**Mest skorandi leikararnir hjá báðum liðum eru framvegis aktivir, men hvørgin teirra verður við á vøllinum, tá Føroyar og Fraklandi bresta saman í annaðkvøld**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Hvørki Rógvi Jacobsen ella Thierry Henry vera tøkir mikukvøldið. Fyrst nevndi er nústaðni við at koma seg eftir drúgvan skaða, meðan Thierry Henry fekk ein skaða um vikuskiftið, tá hann við FC Barcelona spældi venjingardyst í móti meksikanska liðnum Guadalajara.

Sostatt mugu bæði Brian Kerr og Raymond Domenech síggja burtur frá sínum toppskjúttum, sum annars hava spælt í øllum fýra undanfarnu dystunum, liðini hava møtt hvørjum øðrum.

Í hesum dystum hevur Thierry Henry havt takið á Rógva Jacobsen. Henry hevur nevniliga skotið tvey mál, meðan Rógvi Jacobsen ikki hevur skotið nakað mál í móti Fraklandi.

Henry skoraði fyrsta mál sítt í móti Føroyum, tá hann 11. oktober í 2006 økti um leiðsluna, soleiðis at Fraklandi legði seg á odda 2-0. Dysturin endaði annars 5-0. Seinna málið í móti Føroyum gjørdi hann seinast liðini møttust. Hetta var 13. oktober í 2007, tá Henry aftur hesaferð skoraði til 0-2. Tá vóru bara átta minuttir spældir og eisini hesaferð var talan um stórtap, 0-6

### Saknur í Rógva

Thierry Henry hevur spælt 111 landsdystir og hevur skotið 48 mál, í mun til Rógva Jacobsen, sum hevur spælt 52 landsdystir og hevur skotið 10 mál. Teir báðir eru mest skorandi leikararnir fyri sítt land.

Lítil ivi man tó vera um, at til dystin í morgin saknar Brian Kerr nokk Rógva Jacobsen meir, enn Raymond Domenech saknar Thierry Henry.